# Skurðviðgerð/útistandandi oyru — Aures alatae



## Fyrireiking

Skurðviðgerðin fer fram í lokalari doyving.
Tí er ikki neyðugt at vera fastandi.
Møtt verður á B4/A3 sama morgum kl.7.30.
Á deildini verður nakað av hárið rakað rundanum oyruni (uml.2 cm).
EMLA (= doyvandi krem) verður koyrt á oyruni.
Uml. 1 tíma áðrenn skurðviðgerðina fær tú/barn títt eina “stillandi” tablett.

## Skurðviðgerðin

Skurðviðgerðin varir 1½ - 2 tímar og ger fram á eini stovu á skurðgongini.
Lokal doyving verður sproytað undir húðina rundaum oyrað.
Ein sjúkrarøktarfrøðingur situr hjá tær/barni tínum undir allari skurðviðgerðini.
Vit hava ein fløgu/bandspælara, so tak endiliga fløgur ella bond við, sum tú kanst lurta eftir undir skurðviðgerðini.

## Aftaná skurðviðgerðina

Fyri at styðja aftaná skurðviðgerðina, verður umvav lagt á oyruni og rundan um høvdið (sum eitt hárband).

Landssjúkrahúsið

Hetta umvav skal sita í 10 dagar.
Tú/barn títt verður útskrivað/ur sama seinnapartin. Vanligt er at hava nakað av pínu í oyrunum, tá lokaldoyvingin er burtur. Gott er tá at eiga t.d. Panodil heima—fæst í hondkeypi á Apotekinum.

## Ambulant vitjan

Ein ambulant tíð verður givin at møta á Oyrnadeildini 9-10 dagar seinni, har umvavið og træðrirnir verður tikið.
Komandi 2-3 vikurnar skalt tú/barn títt sova við einari nethúgvu, sum fæst frá okkum.

## Áheitan

Skuldi umvavið loysnað í úrtíð, setið tykkum tá í samband við Oyrnadeildina alt fyri eitt á tlf. 304510.
Tað er av stórum týdningi, at umvavið ikki verður vátt, tí má hárvásk bíða til hendan er tikin av.
Ikki íðka krevjandi ítrótt í 2-3 vikur aftaná skurðviðgerðina.

## Sjúkramelding

Vanligt er at verða sjúkrameldað/ur í 10 dagar. Men eingin forðing er fyri at fara aftur í skúla ella til arbeiðis, um tú ikki hevur tungt arbeiði, áðrenn hendan tíð er farin.

Vinarliga
Starvsfólkið á Oyrnadeildini

Landssjúkrahúsið